FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Íslendskur lestrarstuðul

Íslendska Mentamálaráðuneytið bjóðar føroyingum at søkja stuðul (77.500 ísl.kr. um mánaðin í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum máli og bókmentum á hugvísindadeild Háskóla Íslands lestrarárið 2007/2008. Stuðul kann eisini latast til nám í altjóða námi í íslendskum miðaldarbókmentum á M.A.-stigi.

Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentunum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.

Námið byrjar 1. september 2007 og endar 30. apríl 2008.

Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. mars 2007. Umsóknarblað og kunning fæst á www.hi.is ella við at venda sær til Setursskrivstovuna.

Fróðskaparsetur Føroya
Seturskrivstovan
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO-100 Tórshavn
Tel. 35 25 00
Fax 35 25 01

TEAM85

---

Starvslýsing

Heimatænastan

## Heilsuhjálpari til Heimatænastuna Vágoy/Norðstreymoy

Søkt verður eftir heilsu-/heimahjálpara at arbeiða í Vestmanna at byrja 1. apríl 2007 ella skjótast til ber í starvsbrøki 25/40.

**Førleiki:**
- Fyrimunur er, um tú hevur prógv sum heilsuhjálpari ella hevur royndir innan eldrarøkt.
- Hevur góð samstarvsevnir og áræði at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi starv í eini skipan, sum er í støðugari menning. Eitt starv, har tú bæði fert at virka í tøttum samstarvi við onnur og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Uppgávur tínar verða, umframt at veita praktiska hjálp, eisini at veita hjálp til persónliga røkt til heimabúgvandi pensjonistar.

Eru spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Maluna Helgadóttir, økisskrivara, á tlf. 333249/226888.

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið fevnir um Nærverkið. Tænastustaðurin fyribils er Heimatænastan Vágoy/Norðstreymoy.

**Umsókn:**
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda til:

Heimatænastan Vágoy/Norðstreym
Økisskrivsstovan
Fo 370 Miðvágur
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari

**Umsóknarfreist: 23. mars 2007.**

Heimatænastan

## Ítrivsvegleiðarar

**Ítrivsvegleiðari til Eldrasambýlið í Vestmanna**
Søkt verður eftir ítrivsvegleiðara til búfólkini í Eldrasambýlinum í Vestmanna at byrja 1. apríl 2007 ella eftir nærri avtalu.

**Ítrivsvegleiðari til Korndalsbýlið á Eiði**
Søkt verður eftir ítrivsvegleiðara til búfólkini í Eldrasambýlinum á Eiði at byrja 1. apríl 2007 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið hjá ítrivsvegleiðarunum verður at skipa fyri stimbrandi tiltøkum við støði í førleika og áhuga hjá einstaka búfólkinum.

**Ynskiligt er, at umsøkjarar:**
- hava viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- hava hug og hegni at starvast við eldri fólki og at samstarva við ymiskar fakbólkar
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og tilrættaleggja dagin í mun til tørvin hjá einstaka búfólkinum
- dugir væl at samskifta og samstarva

Onnur áhugað, sum ikki hava útbúgving, eru vælkomin at søkja tíðaravmarkað starv.

**Setanartreytir:**
Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna og størvini verða lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til økisleiðaran á tlf. 33 32 49 / 28 22 49.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:
Heimatænastan Vágar/Norðstreym
Økisskrivsstovan
370 Miðvágur
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari

**Umsóknarfreist: 23. mars 2007.**

**Les um onnur størv á www.naerverk.fo / leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

---



# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Bumshamarsvegur 15 til sølu, um hóskandi boð fæst.

| | |
|---|---|
| Matr. nr. | 109 |
| Grundøki: | 526 m² |
| Húsini: | ca. 124 m² í tveimum hæddum. Í kjallarahæddini er nýgjørd íbúð við egnari inngongd. Nýtt bilhús er á ognini. |

Hetta eru timburhús bygd í 1968 á betonggrund og hava stáltak.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791/222252**

---

Sosialin

---

# Frá Sandoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur verður í Samljóð Skopun Leygarkvøldið 10. mars kl. 18.00

Kl.19.00 verður fundur undir heitinum »Flokkurin møtir veljarunum«. Við á fundunum verða ting- og landsstýrisumboð floksins.

Nýggir limir kunna tekna seg.

***Sandoyar Javnaðarfelag***

---

FRÁ MIÐVÁGS ARBEIÐARAFELAG

Aðalfundur verður 24. mars 2007

***Nevndin***

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo